# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Jákup Kass 85 ár

Mikudagin 18. november fylti Jákup Kass á Strondum 85 ár.

Jákup er ættaður av Strondum. Hann er elstur av teimum tíggju børnunum hjá Sannu og Bartal Johansen í Kass. Hann tók málsligt studentsprógv í 1944, og eftir kríggið fór hann til Keypmannahavnar, har hann gekk á Niels Brock. Síðan var hann í mong ár saman við pápanum og brøðrunum við í handilsvirksemi og útgerðarfelag á Strondum.

Í seksti árunum fór Jákup í starv hjá oljufelagnum Esso, og familjan flutti til Havnar at búgva. Hann tók við sum stjóri á Esso í 1971 eftir Esmar Fuglø, sum tá legði frá sær. Samstundis sum Jákup var stjóri á Esso, læs hann til prest og røkti onnur álitisstørv.

Í 1980 segði hann seg úr stjórastarvinum og tók við sum prestur á Nesi í Eysturoy, har hann var sóknarprestur til 1994.

Frá ungum av var hann virkin í heimamissiónini, og var hann eitt skifti formaður fyri føroysku heimamissiónini.

Jákup Kass giftist í 1949 við Onnu Johansen, sum eisini er ættað av Strondum. Tey fingu trý børn: Marjan, Bartal og Karin.

*-red*

## Millumskúlaflokkur útferð í Nólsoy



Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin her er av næmingum í einum millumskúlaflokki, sum er á útferð í Nólsoy skúlaárið 1948/49.

**Aftasta rað f.v.:** Kári Petersen, Árni Isholm, Anders Hansen og Anna Simonsen

**Miðraðið f.v.:** Tordis Mohr, Kári Hansen, Katrin Hansen og Sólvá Mikkelsen.

**Fremst f.v.:** Gulli Johansen, Birna Helmsdal, Margit Hansen, Hervør Joensen og Elsebeth Sloan.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024 (Mynd nr. 37).

*Myndaeigarar: Katrin Samuelsen og Margit Hansen*

†

### Andlát og jarðarferðir

**Eilif Christiansen**, ættaður úr Vági, búsitandi í Hammerfest, andaðist mikudagin 18. november, 87 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Rypefjord kapell týsdagin 24. november kl. 11.

### Tøkk

Hjartaliga tøkk til tykkum, ið gleddu og mintust meg á 90 ára degnum tann 6. nov.

**Heilsan**
**Hildigarð Hansen, Syðrugøta**

†

**Agna Hedegaard**
f. Klein i Vestmanna den 02.10.1940
bosiddende i Værløse, Danmark

har, efter lang tids sygdom, fået fred den 20.11.2009.

*På familiens vegne*
**Jørn, Toni og Sanna**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Hans Jørgen Dam**
Sandavágur

andaðist í Miami í Florida fríggjadagin 20. november, 68 ára gamal.
Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Familjunnar vegna*
**Nancy,**
**Terje, Erhard og Katrin**

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

### Dagurin

**23. november. Klæmintsmessa.** Vit vita, at hesin Clemens (deyður umleið ár 107) livdi í Róm, tá ápostulin Pætur var á døgum, og gjørdist triði maður í stóli hansara. Eisini verður dagurin róptur fyrsti vetrardagur, tá ið vetrarfjórðingsárið byrjar. Latínska navnið Clemens merkir hin mildi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*